gult2 cyan2 magenta2 svart2



# Geir Wardum venja Stjørnuna

**Kvinnuliðið hjá Stjørnuni hevur fingið nýggjan venjara, og nú verður sett hol á hondbóltsárið í Klaksvík**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Tað verður Geir Wardum, sum nú skal venja besta kvinnuliðið hjá Stjørnuni. Venjarin seinastu árini, Røgvi Nielsen, flytir til Havnar at verða venjari.

Geir Wardum hevur drúgvar royndir sum hondbóltsspælari, og hann hevur eisini verið venjari áður. Hann skal saman við Guttormi Sørensen, sum verður konditiónsvenjari, fáa kvinnuliðið í rætta formin til komandi kappingarár.

Stjørnan hevur seinastu tvey árini vunnið ávíkavist gull og silvur í landskappinginum, og nú verður hol sett á hondbóltsarbeiðið aftur.

Mánakvøldið klokkan 21.00 hevur Stjørnan ársfund á loftinum í Kí-høllini.

# I Am hitar upp í Sørvági



*I Am stendur frammanfyri eini risaavbjóðing í Noregi í komandi viku.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Gospelbólkurin I Am hevur aðalroynd í Sørvági, áðrenn teir fara til størsta gospelfestivalin í Norðureuropa at spæla**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Leygarkvøldið klokkan 23.00 fer gospelrockbólkurin I Am at spæla í Bio-høllini í Sørvági. Hetta er seinasta royndin hjá bólkinum, áðrenn teir fara til Noregs at spæla á stórum gospelfestivali.

Teir í I Am fara av landinum sunnudagin, og mánadagin byrjar festivalurin, sum verður hildin á Risøya, sum liggur nærindis Kristiansund har suðuri í Noregi.

Skærgaardsfestivalurin verður vanliga vitjaður av 50.000 fólkum, og konsertir eru á eini átta pallum. I Am skal spæla fýra ferðir á ymiskum pallum á festivalinum, og teir hava fyrireikað seg sera væl til ferðina.

Ein umboðsmaður fyri Skærgaardsfestivalin var í Føroyum herfyri og lurtaði eftir I Am. Eftir hetta vórðu teir bodnir at luttaka.

– Vit eru væl nøgdir við tíðirnar, sum vit skulu spæla, tí teir liggja klokkan 10 og 11 á kvøldið, sigur Birgir Sigurðsson, sum er sangari í I Am.

# Halda fram við at skera flak

**Vesturvón ætlar ikki at fara undir at heilfrysta fisk, hóast flakaprísurin er svikaligur í løtuni**

FISKIVINNA
*Eyðun Klakstein*

Reiðaríið hjá flakatrolaranum Vesturvón hevur ongar ætlanir um at fara at heilfrysta fisk, hóast prísurin á hesum er hægri enn flakaprísurin í løtuni.

– Vit halda fram við at skera flak, hóast marknaðurin er sum hann er í løtuni. Tað halda vit loysir seg best í longdini, sigur Ólavur Petersen, reiðari á Vesturvón.

Í Noregi eru verksmiðjutrolararnir farnir at heilfrysta ein part av síni veiði, tí hetta gevur góðan prís. Við at heilfrysta upp til ein triðing av veiðini, ber til at fáa millum 10 og 20 prosent meiri burtur úr, halda norðmenn.

Orsøkin til hetta er, at prísurin á heilsfrystum fiski, sum verður virkaður til saltfisk og klippfisk, er høgur í løtuni, samstundis sum flakaprísurin er lækkaður.

Tað er fyrst og fremst toskur yvir 2,5 kilo, sum verður heilfrystur, men summir trolarar frysta eisini fisk niður til 1,5 kilo, tí prísurin fyri rundan fisk er so góður í løtuni.

†

**BIRGITH MORTENSEN**
fødd Sivertsen

andaðist mikudagin 27. juni í heiminum í Hoyvík, 55 ára gomul.

Jarðarferðin verður sunnudagin 01. juli kl. 14.00 úr Havnar kirkju.

Vegna tey avvarðandi
**Hans, Elisabeth og Niels**


TIL SØLU



Um hóskandi boð fæst verður virkisbygningurin hjá P/f Langasandur Timburhandil seldur. Bygningurin stendur á havnaøkinum í Kollafirði og er umleið 750 fermetrar til støddar. Bygningurin er í tveimum hæddum, plus eina triðju hædd sum er 72 fermetrar. Grundøkið sum bygningurin stendur á er ogn.

Langasandur Timburhandil
Tel 42 15 85 / 28 60 10 / 22 66 61


gult3 cyan3 magenta3 svart3



# Brøðurnir Olsen spæla í Havn

*Brøðurnir Olsen spæla fyrst í august mánaði á stórari konsert í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn*



**Heimskendu donsku Brøðurnir Olsen spæla fyrst í august mánaði í ítróttarhøllini á Hálsi. Ætlaða konsertin í Klaksvík er avlýst, tí loyvi fekst ikki at halda konsertina í Grøv**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Donsku Brøðurnir Olsen koma fyrst í august mánaði til Føroya at spæla. Í fyrstu syftu var ætlanin at halda hesa konsert í Grøv í Klaksvík, men hetta verður nú av ongum.

Skógfriðingarnevndin hevur noktað fyri, at tiltakið kann haldast, hóast ein samd mentanarnevnd hjá Klaksvíkar býráði staðiliga heitti á Skógfriðingarnevndina um at játta loyvi til konsertina.

Formligi myndugleikin á økinum er Skógfriðingarnevndin, og tí er tað hennara avgerð, sum er endalig. Skógfriðingarnevndin grundgevur í sínum svari fyri, at plantuvøksturin í Grøv kann líða undir slíkum stórum tiltaki, og ivin má koma vøkstrinum til góðar. Tí kann nevndin ikki geva loyvi til konsertina.

Tónleikaportalurin Pop.fo, sum stendur fyri vitjanini hjá Brøðrunum Olsen, hevur tí avgjørt, at konsertin verður í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn ístaðin.

Konsertin verður leygarkvøldið 4. august kl. 21.00, og umframt heimskendu donsku Grand Prix brøðurnar verður eisini serligt føroyskt undirhald á skránni.

# 80 listaverk á framsýning

**Árliga varmakeldu-framsýningin er opin um vikuskiftið. 80 listaverk av ymsum slagi verða sýnd fram**

LIST
*Eyðun Klakstein*

**Fuglafjørður:** Fríggjakvøldið lat listaframsýningin upp í Fuglafirði. Talan er um árligu varmakelduframsýningina, sum verður hildin fyri 32. ferð.

Tað eru fyrst og fremst listarfólk úr Fuglafirði, sum sýna fram á framsýningini, men onkur er eisini aðrastaðni frá.

Millum nøvnini, sum eru við, kunnu nevnast Heðin Kambsdal, Øssur Mohr, Frits Johannesen, Magni á Lakjuni, Jógvan Háfjall og Marjun í Lambanum.

Samanlagt eru 80 listaverk við á framsýningini.

Framsýningin er í fimleikahøllini í skúlanumí Fuglafirði, og hon er opin alt vikuskiftið.

# Kiosk Vár til Klaksvíkar

**Leygardagin letur Kiosk Vár upp stóra kiosk í Klaksvík. Kioskin skal hava opið frá tíðliga av morgni til seint á kvøldi**

HANDIL
*Eyðun Klakstein*

Klaksvík: Nú fer Kiosk Vár eisini at lata upp kiosk í Klaksvík. Leygardagin letur nýggja kioskin upp í handilshúsunum við Klaksvíksvegin.

Hans Petur og Paula Ellingsgaard reka Kiosk Vár, og tey hava í nógv ár havt stóra kiosk í Runavík. Nú fara tey at royna seg í Klaksvík eisini.

Kiosk Vár fer at hava opið stóran part av degnum – frá klokkan sjey á morgni til klokkan 11 á kvøldi.

Kioskin fer at selja alskyns kioskvørur, og eisini verður bakstur av ymsum slagi at fáa. Latið verður upp leygardagin klokkan 10.